

MYND: JENS KRISTIAN VANG

Rakul og Johan – nýgift og lukkulig



Vøkur brúður í hvítum kjóla. Brúðgomurin var í Dracula-klæðum



BRÚDLEYPSMYNDIR: SARAH ZACHARIASSEN

Vígslan var í byrjanini av sjálvari veitsluni í Dansifrøi

Rakul, at tað loysir seg ikki at baksast við handan gamla, tvøra mannin. Men tað loysti seg, sigur Johan Dalsgaard.

Foreldrini hjá Rakul høvdu tað eisini trupult fyrstu tíðina, eftir at hon og Johan høvdu funnið saman.

– Eg skilji øgiliga væl, at tað var hart fyri tey í fyrstuni. Tí hvør ynskir sær, at dóttirin fær sær ein 20 ár eldri mann, sum hevur verið psykatriskur patientur og eitt skifti var meira ella minni heimleysur. Men nógv er broytt hesi 5 árini, vit hava verið saman, og fólk hava sæð, at tað ber til, og nú vita tey eisini, at vit meina tað alvorligt, tí vit eru gift. Vit hava heldur ikki fingið so nógvar viðmerkingar seinasta árið, sum vit fingu fyrstu tíðina, sigur Rakul.

## Kundi verið pápi tín

Tey eru ikki bara ymisk sum persónar, stórur aldursmunur er eisini millum tey, og tað hava tey fingið nógvar viðmerkingar um. Men Rakul hevur funnið sær eitt gott svar:

– Fólk hava sagt við, at hann kundi verið pápi tín. Tá havi eg bara svarað, at »maðurin hjá tær kundi verið beiggi tín«.

– Tað eru 20 ár á muni millum okkum, men tað havi eg ongar trupulleikar við. Vit rigga sera væl saman, hóast vit eru fullkomnir mótsetningar.

– Eg vil helst hava stýr upp á, hvat skal henda, men Johan er totalt impulsivur. Saman við honum veit eg ongantíð, hvat dagurin hevur at bjóða. Hann kroystir meg eitt sindur at prøva ting av, men saman við honum tori eg taka kjansir. Onkuntíð verður sagt, at fólk vilja hava tryggleika ella frælsi, men saman hava vit tryggleika í frælsinum, sigur Rakul.

## Gulløl við á møti

Fyrstu tíðina, tá ið Johan og Rakul gingu saman, drakk Johan illa, og tað var eitt stríð hjá honum at leggja av. Stundum vóru framstig, men so datt hann út í aftur.

– Eg havi gingið nógv í Filadelfia, og eg vildi hava Johan við mær á møti. Hann ivaðist eitt sindur, men segði at hann kundi koma, um hann slapp at hava øl við sær. Hann tordi ikki at verða edrúur á møti. So fyrstu tíðina hevði hann tvær gulløl í jakkalummanum, tá ið vit fóru á møti. Tær drakk hann so í onkrum steðgi og var altíð hálvfullur á møtinum.

– Fyrstu ferð, vit komu heim, og hann hevði aðra ølina við sær heimaftur, var eg sera glað, og vit prátaðu nógv um tað. Og so hendi tað eisini, at hann kom heimaftur við báðum fløskunum og hevði ikki brúk fyri at hava øl við sær á møti.

Johan stríddist við at leggja av at drekka, men tað var ikki lætt. Hann var niðri hjá trúðarfelagsskapinum Evangelist og fekk góða hjálp, men eftir at hann kom heimaftur, datt hann útíaftur.

Men so hendi tað, sum broytti hann fullkomiliga.

– Johan ringdi til mín eitt kvøldið fyri júst trimum árum síðani og segði, at nakað heilt serligt var hent. Hann var bæði bangin og glaður, tí hann føldi á sær, at hann var givin at drekka. Hann kallar tað »tað bláa ljósið«, sum fekk hann at leggja av. Tað hendi simpelten frá einari løtu til aðra, og síðani hevur hann ikki drukkið. Eg hevði ikki klárað at fingið hann at lagt av, og hann hevði neyvan klárað tað sjálvur, men tað hendi eitt undur, sigur Rakul.

Hon og Johan giftust á trý ára degnum fyri »bláa ljósinum«.

## Búgva í Famará

Rakul og Johan Dalsgaard skulu búgva í Fámará í Suðuroy, har tey hava gjørt avbyrgdu húsini í stand.

– Tað verður rættiliga avsíðis at búgva har, og hatta er ikki nakað, sum eg vanliga hevði torað. Men saman við Johan vil eg gjarna búgva har. Vit hava ymiskar ætlanir fyri, hvat vit fara at gera, og eg gleði meg at flyta suður, sigur Rakul.

Komandi tíðina skal hon lutvíst búgva í Fámará og lutvíst í Havn. Hon lesur til pedagog á Læraraskúlanum og hevur eitt ár eftir.

– Nú er tað soleiðis, at eg eri í Havn mánadag, týsdag og mikudag, og so eri eg har suðuri hinar dagar, men tá eg eri liðug at lesa, flyti eg veruliga suður at búgva, sigur Rakul Dalsgaard.

# Gift í veitsluni

Brúdleypið hjá Rakul og Johan Dalsgaard var óvanligt. Tey høvdu sjálva vígsluna í byrjanini av veitsluni. Tá ið Johan í Kollafirði kom inn, rungaði temaið frá Superman-filmunum, og verturin fyri kvøldið presenteraði við harðari rødd brúðgomin.

– Tá ið tað var gjørt, var samstundis sagt, at her er nógv loyvt. Vit høvdu 300 gestir, og vit skuldu fáa tey at slappa av. Vit skuldu fáa tvey sløg av fólkum at kenna seg væl saman, sigur Johan í Kollafirði.

Vanliga er brúðarparið inaktivt til sítt egna brúdleyp, men soleiðis var ikki í brúdleypinum hjá Johan og Rakul. Brúðgomurin, sum er vanur at framføra tónleik, hevði einar 12 framførslur um kvøldið, brúðurin sang eisini ein sang, og brúðarparið helt eisini stýr upp á ymiskt annað.

– Vit vóru teknikarar. Vit góvu boð um ljóð og ljós og royk, sigur Johan.

– Johan ætlaði, at tey, sum skuldu sita við síðuna av okkum til brúdleypið, vóru tøkningurin og ljósmaðurin, men tá segði eg altso nei, sigur Rakul

– Brúdlepið var eitt mega-live show frá 19 til 02. Tað var sett í gongd við eini roykmaskinu og popøsum tónleiki. Gestirnir skuldu bara spenna trygdarbeltið og halda fast. Hetta var Las Vegas showið, sum vit hava ynskt okkum í Føroyum, men sum ongantíð kom. Hvørjaferð eg havi ætlað mær okkurt, sum minti um hetta, so hava fólk sagt, at tað er ikki vanligt, so eg mátti eiga showið sjálvur fyri at sleppa at gera tað, sigur Johan.

Klæðini hjá brúðgominum vóru eisini øðrvísi. Johan var í Dracula-klæðum, sum hann hevði keypt í handlinum Skorti, ið vanliga selir eitt nú grýluklæði.